# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Nú alt er gjørt av nýggjum, er Wembley kanska besta stadion í heiminum*

*Claus Bech Jørgensen, Blackpool*

# Fyrsti føroyingurin á Wembley



*Claus Bech Jørgensen sigur seg vera vónbrotnan, um hann ikki verður fyrsti føroyingurin, sum sleppur at spæla á víðgitna Wembley-leikvøllinum*

*Tilgjørd mynd: Álvur Haraldsen/Polfoto/AP*

**Nýggi Wembley-leikvøllurin er karmurin, tá Claus Bech Jørgensen og Blackpool sunnudagin spæla seinasta dystin hetta kappingarárið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinastu nógvu mánaðirnar hevur gingið strúkandi hjá Claus Bech Jørgensen og Blackpool. Jútlendingurin við føroyskum rótum á móðursíðuni hevur verið fastur maður á liðnum, sum við sigri eftir sigri hevur vunnið seg alt longur upp á stigatalvuna.

Byrjanin var annars einki at reypa av, og eftir fyrstu tíggju umførini var liðið at finna óhugnaliga nær niðurflytingarstrikuni.

– Hyggur tú at talvuni í dag, so vóru vit bert tvey stig frá beinleiðis uppflyting, so vit kunnu kanska iðra okkum um, at vit ikki komu ígongd eitt ella tvey umfør fyrr. Men partvíst, so hevði venjarin skift nógv fólk undan kappingarárinum, og tað tók sína tíð at fáa okkum samanspældar. Og partvíst prógvar hetta eisini, hvussu nógv sjálvsálit hevur at siga í fótbólti. Tí talan er um stórt sæð somu spælarar gjøgnum alt kappingarárið.

## Kunnu seta met

Júst sjálvsálitið kann væl fáa ein heilt avgerandi leiklut, tá play-off finalan verður spæld sunnudagin. Ikki bara tí talan er um finalu, men eisini tí dysturin verður spældur á sjálvum Wembley. Og tí hetta setir serstøk krøv, til sálarigu javnvágina, sum altíð er so týdningarmikil.

- Tað er jú heilt fantastiskt at skula spæla har. Wembley er at rokna sum eitt hugtak í fótbólti við allari sínari søgu. Og nú alt er gjørt av nýggjum, er Wembley kanska besta stadion í heiminum. So bara tað í sjálvum sær verður ein veldug uppliving.

- Men fyri okkum ræður um at fáa okkara spæl at koyra. Sjálvsálitið er í topp í løtuni. Vit hava vunnið níggju dystir á rað, og tað er tað sama, sum gamla metið hjá felagnum er. Við øðrum orðum, so kunnu vit seta met, um vit vinna sunnudagin, og tað vildi – saman við eini uppflyting – verið ein heilt perfektur endi upp á kappingarárið hjá okkum.

Mótstøðuliðið sunnudagin er Yeovil, sum endaði á einum fimta plássi á stigatalvuni í ensku Leagu One. Í kappingini vann Blackpool útidystin móti finalumótstøðuni, meðan heimadysturin endaði við javnleikni.

Tí kann Blackpool kanska roknast sum favorittur, men tað er nú ikki eitt heiti, sum Claus leggur nakað í.

- Teir hava eitt gott lið, sum spælir góðan fótbólt og har menn eru væl fyri fysiskt. Tí ivist eg onga løtu í, at talan verður um ein truplan dyst hjá okkum. Men samstundis trúgva vit sjávlandi upp á okkara møguleika.

## Við frá byrjan

Í góða stimanum, sum Blackpool hevur havt, hevur Claus átt sín týðandi leiklut. Fleiri dystir á rað hevur hann verið á vøllinum í samfullar 90 minuttir, og tí vónar hann eisini, at hann verður millum teir fyrstu ellivu sunnudagin.

– Venjarin sigur okkum ikki liðið, fyrr enn á dystardegnum. Men við gongdini seinastu mánaðirnar í huga, so verði eg vónbrotin, um eg ikki byrji inni.

# Atli vann á Toda

**Fremad Amager er undir trýsti, eftir at teir taptu heimadystin móti Frem. Enn eru teir oman fyri niðurflytingarstrikuna, men bert eitt stig er nú niður til AB**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Longu eftir einum minutti var Todi Jónsson nær við at skora, tá Fremad Amager í gjár spældi móti Frem. Todi var ein støðug hóttan móti verjuni hjá Atla Danielsen og liðfeløgunum í Frem, og hann legði eisini upp til einsamalla Fremad-málið, sum Ali Aliji skoraði.

Nóg mikið til stig var hetta tó ikki. Við málum frá Wassim El Banna, Tommy Olsen og Martin Jeppesen vann Frem dystin 3-1. Serliga hevði Frem eitt gott tak á dystinum stóran part av seinna hálvleiki, og tí var sigurin uppiborin, verður sagt á heimasíðuni hjá Fremad Amager.

Tem Hansen, Todi Jónsson og Jónas Tór Næss byrjaðu allir á vøllinum fyri Fremad Amager. Í 67. minutti kom Andrew av Fløtum inn fyri Toda Jónsson. Hjá Frem spældi Atli Danielsen samfullar 90 minuttir á miðvøllinum.

Fremad Amager er nú bert eitt stig oman fyri niðurflytingarstrikuna. Næsti dysturin verður á útivølli móti HIK, har komandi Fremad-venjarin, Jakob Friis-Hansen, enn er venjari.